

- Tað er altíð onkur, sum ikki dámar teg. Øll kunnu ikki elska teg. Og um onkrum ikki dámar tað, tey síggja, so mugu tey bara hyggja hinvegin, heldur Sissal, sum eftir 54 dagar á skíggjanum mátti veittra farvæl til milliónina

*Mynd: TvDanmark*

# Øll kunnu ikki elska teg

**- Eg havi lært ótrúliga nógv, tað hevur verið eitt fantastiskt upplivilsi, og eg var púra avklárað við, at eg reyk út hósdagin. Um eg havi traðkað nakran á tærnar, so vil eg siga orsaka, men tú kanst ikki gleða øll. Øll kunnu ikki elska teg, sigur Sissal úr Big Brother í samrøðu við Sosialin**

BIG BROTHER
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Hósdagin varð føroyska Sissal send út úr Big Brother húsinum í Mileparkini í Keypmannahavn. 54 dagar fekk hon í húsinum, og sum bonus fekk hon eftir øllum at døma, Robert við sær í kuffertinum út — ikki bókstaviliga, men Big Brother parið hevur eftir øllum at døma ætlanir um at flyta saman, tá Robert kemur út úr húsinum.

Sissal Olafsdóttir Frisdahl, ella bara Sissal, sum vit kenna hana, er nú aftur úti í veruliga lívinum. Eftir knappar tveir mánaðir í eygleidda húsinum, er hon nú ein fríur persónur.

- Hatta var eitt fantastiskt upplivilsi, sum eg havi lært ótrúliga nógv av. Eg var púra avklárað við at skula út, tí eg visti, at eg skuldi út til familju og vinir, sum í síðsta enda hava nógv meira at siga fyri meg enn Big Brother, greiðir Sissal frá.

Sum sagt, so reyk hon út hóskvøldið, og allur fríggjadagurin varð brúktur teir ymsu fjølmiðlarnar. Mest danskar, men eisini føroyskar.

## Nógv at tosa um

Eftir sendingin varð liðug hóskvøldið fór Sissal á eitt hotell, har hon skuldi yvirnáttað. Har bíðaðu familja og vinir eftir henni.

- Familjan tók sjálvandi ímóti mær við opnum ørmum. Tey vóru sjálvandi kedd av onkrum, sum eg hevði sagt og gjørt, men ein familja heldur altíð saman. Nú fingu vit ikki tosað so nógv um tað, men tað fara vit uttan iva at brúka nógva tíð uppá, sigur Sissal.

Nógv hevur verið tosað og skrivað um, at Sissal og Robert eru fyrsta parið í donsku Big Brother søguni, sum hevur verið saman kynsliga. Og tað veit Sissal eisini væl av.

- Eg kann verja tað yvir fyri mær sjálvari og eg standi 100% inni fyri tí, sum eg havi gjørt. Talan var um eina avgerð, sum vit tóku saman. Hatta var nakað sum hendi, svarar Sissal, tá hon verður spurd um, hvussu tað kennist, at verða tann fyrsta, sum hevur syrgt fyri, at donsku sjónvarpshyggjararnir fingu Big Brother sex fyri fyrstu ferð.

- Vit eru sum vit eru, og tað Robert og eg gjørdu, var 100% av kærleika, um eg so má siga.

## Sálarligar avbjóðingar

Sissal sigur seg ikki angrað, at hon valdi at vera við í sendingini.

- Eg meldaði meg bara til til stuttleika. Eg hevði ongantíð trúð, at eg fór at koma so langt, sum at vera við í sendingini, men tað var bara stuttligt. Nú eri eg ein persónur, sum heldur, at ein skal ikki gera ting umaftur, so eg veit ikki, um eg hevði meldað meg til aftur, sigur Sissal, og vísir á, at tað vóru 54 strævnir dagar í húsinum.

- Tað var ógvuliga intenst, og ein hevur sagt og gjørt nógv inni har, sum ein ikki hevði gjørt, um ein var undir vanligum umstøðum. Men eg skal ásanna, at eg hevði væntað meira sálarligar avbjóðingar.

Sissal undirstrikar tó, at tað at vera inni í Big Brother húsinum ein dagligdag er tó eisini ein sálarlig avbjóðing í sær sjálvum.

- Har var nógv sálarligt spæl. Sum til dømis at verða leinkja til tveir aðrar persónar í 48 tímar. Tað eru nógvar umstøður sum hava merkt ein, men ta heilt stóru sálarligu avbjóðingina havi eg tó ikki fingið.

## Umrøða

At Sissal kennir spælireglurnar er ongin ivi í.

- Men eg eri eitt sindur bangin fyri, hvussu eg verði móttikin í Føroyum. Tað góða við Føroyum er, at fólk siga ikki ljót ting beint upp í andlitið á tær, og tey høvdu ikki kastað egg eftir tær, eins og tey gjørdu hóskvøldið. Ella tað er í øllum førum ikki tann uppfatanin, eg havi av føroyingum.

Tá Sosialurin tosaði við Sissal hevði hon tó ikki verið úti í "veruliga lívinum". Meginparturin av degnum var farin til fjølmiðlar, og tí var ringt hjá henni at siga, hvussu fólk tóku ímóti henni.

- Um eg havi traðkað nakran á tærnar, so vil eg siga orsaka. Men eg vóni bara tað besta. Tú kanst ikki gleða øll. Tað er altíð onkur, sum ikki dámar teg. Øll kunnu ikki elska teg. Og um onkrum ikki dámar tað, tey síggja, so mugu tey bara hyggja hinvegin. Men eg eri fyrireikað uppá, at nógv halda, at tað sum eg havi gjørt, er nakað býtt.

## Føroyar sum heimland

Sjálvt um Sissal er fødd og uppvaksin tað mesta av lívinum í Danmark, so sær hon Føroyar sum sítt heimland.

- Eg havi altíð ferðast nógv og búð nógv í Føroyum. Størsti parturin av hjarta mínum er í Føroyum, og eg sigi eisini, at eg eri føroyingur og ikki dani.

Hon vísir á, at hon hevur tosað nógv um Føroyar í Big Brother húsinum, men at TV Danmark 2 bara ikki hevur víst so nógv av tí.

- Eg havi næstan bara tosað um Føroyar, og nú vilja tey flestu, sum hava verið við í sendingini, eisini til Føroyar at síggja tað í veruleikanum. Eg havi serliga tosað nógv við Raz um Føroyar, tí hann hevði eisini verið har.

Men næsti túrurin til oyggjarnar verður eftir ætlan ikki fyrr enn einaferð eftir jól.

Big Brother ævintýrið hjá Sissal er í øllum førum liðugt á hesum sinni. Og hósdagin varð veitrað farvæl til milliónina og góðan dag til veruliga lívið.



# Nú koyra klaksvíkingar í ring

**Leygarmorgunin var rundkoyringin í Klaksvík alment tikin í brúk. Hetta er fyrsta rundkoyring í Norðoyggjum, og ikki so lítið hevur verið at hoyrt frá hesari verkætlan, sum tók nakað longri tíð enn ætlað**

RUNDKOYRING
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað var elsti bilførarin í Klaksvík, 87 ára gamli Jógvan Gerðalíð, sum slapp at verða fyrstur at koyra í rundkoyringini, tá hon alment var tikin í nýtslu leygarmorgunin.

Jógvan minnist, tá fyrsti bilurin kom til Klaksvíkar. Hann sá bilin koma eftir vegnum, og leyp langt lærari, og helt fyri, at teir helst mundu halda seg hava fyrsta rætt, tí teir vóru jú her áðrenn bilarnir.

## Kør i højre side

Jógvan minnist, at í koyrilæruni stóð, at "Trafikken skal gå i højre side". Men vegirnir vóru so smalir tá, at oftast hekk annað hjólið uttan fyri vegkantin.

Næstur at royna rundkoyringina var 86 ára gamli, Jákup Biskopstø. Húsajakku, sum hann verður róptur kann á prutli sínum sigast at vera ein bygdmynd í Klaksvík.

Eftir at borgarstjórin hevði klipt snórin, segði hann nøkur fá orð og takkaði klaksvíkingum fyri teirra tolsemi, meðan rundkoyringin hevði staðið í gerð.

Ymiskir trupulleikar gjørdu, at arbeiðið tók longur tíð enn ætlað, men nú arbeiðið er liðugt, verður tað ein stórur bati fyri ferðsluna í býnum.

Ferðslan í miðbýnum er økt nógv seinastu árini, og ferðslan hevur gingið seint ávísar partar av degnum. Eisini við atliti til undirsjóartunnilin og øktu ferðsluna, sum tá fer at verða, var neyðugt hjá býráðnum at hugsa um, at bøta um ferðsluumstøðurnar í Klaksvík.

Klaksvíkar Kommuna hevur gjørt eina framtíðarætlan fyri vegakervið í býnum, har stórur dentur verður lagdur á trygdina, serstakliga hjá teimum, sum eru til gongu.

Í skrivandi løtu er mánadagur á middegi. Jógvan Gerðalíð hevur verið og hugt, hvussu ferðslan gekk í meldurtíðini. Hóast høga aldurin, er hann enn sum ein unglingi og fylgir øllum tí, sum gongur fyri seg við størsta áhuga.

- Ferðslan gongur væl og uttan steðg, sigur hann.

Og tað er ein stórur lætti fyri klakvískingar, sum mangan hava staðið í langari bíðirøð við posthúshornið.

oman á fiskastykkið hjá Kjølbro av berum forskrekkilsi.

Mangt er broytt, síðani dreingirnir eftir skúlatíð styttu sær stundir við at hanga úr lúkuni á bilinum hjá Mortan-bil.

Tá Jógvan sum 21 ára gamal tók hann koyrikortið í Havn, stóðu nakrir menn mitt á vegnum.

- Koyr bara á teir, segði Fjerbæk Petersen, koyri-





*Elsti bilførari í Klaksvík, 87 ára gamli Jógvan Gerðalíð, fekk heiðurin at verða fyrstur at koyra í rundkoyringini*

*Mynd: Símun á Høvdanum*



*Næstur at royna rundkoyringina, var 86 ára gamli Jákup Biskopstø. Húsajakku, sum hann verður róptur er javnan at síggja á prutli sínum og kann sigast at vera ein bygdarmynd í Klaksvík*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, klippir snórin til fyrstu rundkoyringina í Norðoyggjum*

*Mynd: Bárður Lydersen*





Henda áttanda og seinasta bókin í røðini viðger bráða endan, sum føroyska virksemið í Grønlandi fekk.

Seinast í sekstiárunum var so kalt og so nógvur ísur í Grønlandi, at lítið var at fáa. Flestu skipini funnu sær aðrar leiðir, og útróðrarmenninir góvust at fara til Grønlands um summarið. Við hesum fór ein serlig vinna í søguna.

Um sama mundið fóru føroyingar undir nýggjar vinnur í Grønlandi. Fyrst varð farið at fiska laks við gørnum og síðan at trola eftir rækjum. Hetta virksemið eydnaðist og kastaði væl av sær, meðan vit enn høvdu rættindi undir Grønlandi. Tá ið Grønland fór upp í Felagsmarknaðin, broyttust okkara møguleikar, og nú vóru rættindi ikki longur eitt mál, ið kundi avgerast millum ríkispartarnar. Longu í 1970 varð umhugsað at steingja støðina í Føroyingahavnini, men hon andi kortini heilt til 1989, tá ið landskassin ikki longur vildi gjalda.

Hetta var formligi endin á einum sera týdningarmiklum skeiði í føroyskari vinnulívs- og samfelagssøgu.

**Jógvan Arge**

299,-

SANSIR 355 355